# Siloakórið í Skotlandi



**Kórið vitjar í hesum døgum í Aberdeen, har tey við fjølbroyttari skrá skulu syngja á fleiri støðum, og har tey í morgun syngja fyri borgarstjóranum**

KÓR Á UTTANLANDSFERÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjárkvøldið fór sangkórið í Siloa í Fuglafirði til Skotlands. Tey vitja í Aberdenn, og tey koma til hús aftur mánakvøldið. Í ferðalagnum eru 42 sangarar. Kórleiðari er Eyðun á Lakjuni, sum hevur stjórnað kórinum øll árini, síðani tað varð endurstovnað í 1988.

Hetta er fyrsta ferðin, at Siloakórið er uttanlands. Tá ið tey komu til Aberdenn við flogfarinum hjá Atlantsflog í gjárkvøldið, skuldi borgarstjórin, John Reynolds, standa fyri teimum og taka ímóti. Fyrrapartin í dag er kórið bjóðað at syngja í Aberdeen Town House. Tá fer kórið vegna Fuglafjarðar kommunu at handa borgarstjóranum málning, sum Øssur Mohr í Fuglafirði hevur málað.

Siloakórið skal syngja fleiri ferðir, meðan tey eru í Skotlandi. Í kvøld klokkan 19.30 fara tey at hava konsert í Bridge of Don church. Hetta er samkoman, sum Gudmundur Johanneson gongur í. Hann er hálvur føroyingur, og tað eru ivaleyst fleiri, sum komast við hann. Gudmundur hevur hjálpt fuglfirðingum at leggja ferðina til rættis.

Leygardagin klokkan 11 fer Siloakórið at syngja í Bon–Accord handils-skálanum, og klokkan 19 fara tey at syngja í Salvation Army Citadel. Sunnudagin fara tey at syngja í samkomuni Hebron Evangelical Church klokkan 11.30, og sunnukvøldið klokkan 18 skulu tey syngja í Arbroath, sum er lítil býur einar hálvt hundrað kilometrar sunnanfyri Aberdeen.

### Avbjóðing

Eyðun á Lakjuni sigur, at tað var eina ferð í heyst, at tey gjørdu av, at nú skuldi kórið fara út at ferðast.

– Vit royna eftir førimuni at syngja í Siloa og viðhvørt í øðrum samkomum eisini. Tað hevur týdning at hava serstakar avbjóðingar at venja fram ímóti. Í vetur hevur uttanlandsferðin verið stóra málið, og eg haldi, at vit eru hampuliga væl fyri, nú vit fara avstað.

Skráin er fjølbroytt. Bæði á føroyskum og eingilskum. Tey syngja sálmar og sangir, gospel, nigro spiritual og eisini eitt Kingo lag. Talan er um Nú rennur sólin frí úr Eysturlondum, sum Kári Bæk hevur sett út fyri kór. Millum føroysku sangirnar eru orð og løg hjá Ismari Joensen og Jógvani á Lakjuni, Øssuri Berghamar og Eyðuni Jacobsen.

– Nógv av tí, sum verður sungið á eingilskum, er sovorðið, sum upprunaliga er yrkt á eingilskum, og sum vit plaga at syngja í føroyskari týðing, sigur Eyðun á Lakjuni.

Fylgisspælið er fjølbroytt. Jóhannes Simonsen og Eyðun á Lakjuni spæla klaver, Martin Simonsen spælir orgul, Bárður á Lakjuni spælir bass, og Jóhan á Lakjuni spælir trummur.

Solo sangararnir eru Elisabeth Hansen, Karlina Højgaard og Elsebeth Lassaberg. Trio syngja Elsebeth Lassaberg, Erla á Torkilsheyggi og Levi á Torkilsheyggi.





## TEMA-dagur um íløgur

á Parnassinum á Hotel Hafnia mánakvøldið 5. apríl klokkan 19.30

Øll eru vælkomin.

Íløgufelagið TEMA Kapital bjóðar við hesum til fyrilestrar, spurningar og kjak um íløgur yvirhøvur og serliga nýggju íløgudeildina StockRate.

TEMA Kapital, áður Kaupthing Invest, hevur frammanundan fleiri deildir: Norrøn partabrøv, Lánsbrøv í donskum krónum og Íslendsk lánsbrøv. Nýggjasta deildin eitur StockRate, sum navnframi danin Bjarne Jensen stendur á odda fyri. Hann luttekur á TEMA-degnum.

57 ára gamli Bjarne Jensen er kendur sum bankaserfrøðingur, greinari, fyrilestrahaldari, partabrævaserfrøðingur, ráðgevi, varastjóri hjá Danske Bank og mangt annað. Hann leiðir nýggju StockRate-deildina, ið ger íløgur í partabrøv í stórum og tryggum fyritøkum.

StockRate heldur eyga við 25.000 partabrøvum í yvir 50 londum, sum valt verður út frá.

Skrá fyri TEMA-degnum:

- Framløga av íløgufelagnum TEMA Kapital
  *Wilhelm E. Petersen, formaður*
- Framløga av deildunum hjá TEMA Kapital
  *Peter Holm, stjóri í Kaupthing*
- Leikluturin hjá Føroya Sparikassa
  *Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassa*
- "Eitt lív við partabrøvum"
  *Bjarne Jensen, sum fer at tosa breitt um íløgur og kunnar um StockRate.*

Øll eru vælkomin.

TEMA KAPITAL
KAUPTHING Virðisbrævameklarafelag
FØROYA SPARIKASSI



**Sosialurin**
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo




# Áhugaverdar bókaútgávur

**Fyri fyrstu ferð í longri tíð er ein føroysk bók til vaksin innan fagrar bókmentir komin út. Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur stuttsøgu savnið "ein farri av kolvetni" út**

BÓKMENTIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Føroyski bókaheimurin bleiv í gjár tvær bøkur ríkari. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav í gjár tvær nýggjar upprunabøkur út. Onnur er omanfyrinevnda stuttsøgusavnið hjá Marjun S. Kjelnæs, meðan hitt er barnabókin "um træskoytur og føðingardagsgávuna sum hvarv, ið Guðrun Gaard hevur skrivað, og Bárður Oskarsson hevur gjørt myndir til.



*Marjun S. Kjelnæs gav í gjár sína fyrstu bók út. Bókin, ið ber heitið "ein farri av kolvetni" er eitt stuttsøgusavn við átta søgum og einum ævintýri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fyrsta bókin hjá Marjun

"ein farri av kolvetni" er fyrsa bókin, sum Marjun S. Kjelnæs gevur út. Í bókini eru átta stuttsøgur og eitt ævintýr. Marjun S. Kjelnæs hevur áður vunnið fleiri virðislønir í sambandi við ymiskar stuttsøgukappingar, og eisini vann hon fyrstu virðisløn í kapping um besta útvarpsleik, sum Listastevna Føroya skrivaði út fyri tveimum árum síðani. Fyrr í ár fekk Marjun eisini gávu frá grunni Thorvalds av Steinum til tess, at hon skuldu hava umstøður at mennast sum rithøvundur.

Um nýggja stuttsøgusavnið sigur Marjun, at søgurnar fyri tað mesta snúgva seg um fólk, ið leita eftir onkrum, uttan at tey sjálvi eru vitandi um tað. Marjun sigur, at hon dagliga skrivar upplivingar niður, sum hon so savnar í einari mappu. Av og á setur hon seg so niður og koyrir allar hesar upplivingarnar í ein stóran pott, sum so endar við einari ella fleiri søgum. Søgurnar í nýggja savninum eru skrivaðar í einum tíðarskeiði upp á góð tvey ár, sigur Marjun.

Marjun S. Kjelnæs er sjúkrarrøktarfrøðingur av útbúgving, og hóast tað ljóðar spennandi, so heldur hon ikki, at tað ber til at liva av at skriva bøkur í Føroyum. Somuleiðis heldur hon, at tað gevur góðan íblástur til skrivingina at verða úti á arbeiðsmarknaðinum og millum fólk dagliga. Tó sigur Marjun, at nú hevur hon funnið út av, hvat tað vil siga at geva eina bók út, og tað hevur bara givið henni blóð upp á tánna.

### Stór menning av barnabøkunum

Bókin hjá Guðrun Gaard, "um træskoytur og føðingardagsgávuna sum hvarv", er framhald av eini aðrari bók hjá Guðruni, "um svidnu pussifelluna og øvuta kúvingin", ið kom út síðsta ár. Guðrun Gaard gav sína fyrstu barnabók út í 1982, og hon heldur, at ein sera stór menning er fram innan føroyskar barnabókmentir seinnu árini.

Bókin hjá Guðruni Gaard er prýdd við nógvum vøkrum myndum, sum Bárður Oskarsson hevur teknað. Guðrun Gaard sigur, at í slíkum barnabókum, har myndirnar eru so stórur partur av søguni, er tað eins nógv teknarin sum rithøvundurin, ið fortelur søguna.

Í bókini lesa vit um tær báðar Annu Sofíu og Guðruna, ið ynskja sær ein sparkara. Á føðingardegnum hjá Annu Sofíu skunda tær sær við pápanum út í hjallin, har gávan er goymd, men tá ið tey koma út í hjallin, er gávan horvin.

Nýggja barnabókin hjá Guðrun Gaard er 32 blaðsíður í litum, og hon kostar 95 krónur, meðan stuttsøgusavnið hjá Marjun S. Kjelnæs er 156 síður og kostar 165 krónur í bókabúðunum kring landið.





KONFIRMATIÓNSGÁVAN
Ókeypis teletíðarpakki er við í tilboðunum




+298 303030 www.tele.fo
TELEBÚÐIN
Tilboðini eru galdandi so leingi vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.
Tórshavn 317010 · Miðvágur 332000 · Klaksvík 404500 · Sandur 361000 · Tvøroyri 371000 · Saltangará 404400